# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur**
**Hósdagin 29. nov.**
***Sambýlið í Bøgøtu:*** kl. 19.30 Andakt, Magnus Brahé Jørgensen

**1. sunnudag í advent**
***Argir:*** kl. 11 Hanus Simonsen. ***Barnagudstænastu talvan gongur fyri sjómanskirkjuna.***
***Miðvágur:*** kl. 11 David Johannesen. ***Talvan gongur í Vága prestagjaldi fyri Føroysku Sjómanskirkjuna.***
***Kollafjørður:*** kl. 12, altargongd: Marjun Bæk. Kristiliga Sangkórið luttekur.
***Vestmanna:*** kl. 11, altargongd Mogens Tilsted Christensen
***Í øllum kirkjum í Norðstreymoyar Prestagjaldi gongur talvan fyri ta føroysku sjómanskirkjuna.***
***Eiði:*** kl. 12 messa Emil Olsen. ***Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri hina Føroysku Sjómanskirkjuna.***
***Norðskála:*** kl. 17 ljósgudstænasta Emil Olsen.
***Æðuvík:*** kl. 11, Martin R. Jacobsen
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 14, Familjugudstænasta
***Gøta:*** kl. 15, Familjugudstænasta
***Svínoy:*** kl. 12, altarg., Elsa Funding
***Í Norðoya eystara prestagjaldi gongur talvan fyri Føroysku Fólkakirkjuna***
***Hvalba:*** kl. 12, altargongd, Jónsvein Bech,
***Tvøroyri:*** kl. 14 familju- og barnagudstænasta, Jónsvein Bech.
***Í báðum støðum gongur talvan fyri føroysku Sjómanskirkjuna***

**Konsert í Christianskirkjuni**
Leygardagin hin 1. des. hevur Kallakór Reykjavíkur konsert við adventstónum í Christianskirkjuni kl. 17.

**Sangarar til Hoyvíkar kirkju**
Hevur tú hug at stuðla sálmasangin ein halgidag um mánaðin í Hoyvíkar kirkju, so set teg í samband við organistin á tlf. 319748/589421.

**Eiðis prestagjald**
Hugnaløta verður í Eiðis prestagarði mikukvøldið kl. 20.00 við sálmasangi og drekkamunni. Martin Restorff Jacobsen, prestur, hugleiðir um evnið: Ápostólsku fedrarnir.

**Ebenezer**
Týsdag kl. 18.55 Sangvenjing – Gospel Hearts
kl. 20 Sangvenjing - Ebenezer-kórið.
Mikudag kl. 17.15 Sangvenjing - Kassia.
Kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti - Talari: Sonny Poulsen.
Hósdag kl. 17 Sangvenjing – Barnakórið – Gentir og dreingir 7-9 ár.
Kl. 20.00 Ungdómsmøti - Talari: Einar Vang
Fríggjadag kl. 20 Teen-Night.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans.
Kl. 12.00 Sunnudagsskúli.
Kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Mánadag kl. 12.30 Andakt

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20.00 Bønarskúlin
Mikudagin kl. 17.00 bøn fyri Ísrael og Býnum,
kl. 18.00-19.45 Delli (3. til 6. fl.),
kl. 20.00-22.00 Chill (7. til 10. fl.).
Hóskvøldið kl. 20 Felags ungdómsmøti í Oasuni.
Leygarkvøldið einki Flare.
Sunnumorgunin kl. 10.45 Morgunmøti v/ Alex O'Campo. Kl. 11.30 Barnagudstænasta
www.filadelfia.fo

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Mánadagin 26. nov. kl. 20 Sjómanskvinnuringurin møtist. Øll hjartaliga vælkomin!
Sí annars www.koma.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin 27. nov. kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Týsdagin kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga sangkórið venur. Nýggir sangarar eru vælkomnir við.
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Tensing-kórið venur.
Hósdagin kl. 19 í KFUK: Basarur, sí lýsing aðrastaðni í blaðnum.
Sunnudagin 2. des. í KFUK: Adventsveitsla. Inngangur við Hanusi Simonsen presti. Kristiliga sangkórið syngur.
Mánadagin 3. des. kl. 15 í KFUK: Seinnapartssamkoman, Herluf Heinesen sigur frá um ferð í Nigeria.

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
Mikudagin kl. 17.15 venur barnakórið.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla.
http://www.gospel.fo

**Hebron, Argir**
Mikudagin 28. november kl. 20 Bíbliutími og bønarløta. Evni: Markus 8.
Sunnudagin 2. december kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing.
Kl. 11.30 Samvera við drekka.
Kl. 12.00 Sunnudagsskúli og møti. Rodmundur í Liða talar. Sunnudagsskúlin er hvønn sunnudag kl. 12.
Øll børn eru hjartaliga vælkomin.
Týsdagin 4. dec. kl. 19 BeTwix.
Hjartaliga vælkomin í Hebron!

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Mánadag skótafundir kl. 17 og kl. 19.
Andakt á Ellisheiminum. Streingjakórið venur kl. 20.30.
Týsdag hornvenjing kl. 20.
Mikudag Bønarløta kl. 15.
Hósdag Heimaforbund kl. 20 - fyri allar kvinnur.
Sunnudag kl. 11 Morgunmøti.
Sunnudagsskúli kl. 14.
Møti kl. 18.
suppa, sápa og frelsa síðan 1865.

**Frá Meinigheitshúsinum í Havn**
Mánakvøldið kl. 19 Juniormøti.
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími v. Jógvan Garðsá, evni: Jeramia profetur.
Mikukvøldið kl. 19.30 venur kórið.
Hósdagin kl. 16.00-16.45 venur gentukórið - fyri gentur frá 2. flokki.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Sunnudagin kl. 18 Møti, har messiansk jødisku hjúnini Lisa og David Loden tala og syngja.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Aglow, Havn**
Leygarkvøldið 1. desember kl. 19.30 jólamøti fyri kvinnur og menn í Evangeliihúsinum. Oddvør & Hans Jacobsen tala, og Oasubrøður syngja.
http://www.aglow.fo

**Kollafjarðar Missiónshús**
Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20.
Bønarløta hóskvøldið kl. 19.30.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sandavágur**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman í Meinigheitshúsinum hóskvøldið 29. nov. kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Filadelfia Vágar, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20 bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 16 bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.

**Missiónshúsið Libanon, Sørvágur**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman hóskvøldið 29/11 kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar. Mint verður á jólapakkarnar.

**Kedron, Sørvágur**
Týsdagur 27. nov. Eingin bíbiltími fyri ung (8-10. fl.)
Mikudagur 28. nov. kl. 20: Bønarmøti.

**Berøa Saltangará**
Mikudagin 28.11. kl. 19.30 Húsbólkar.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Týsdagin kl.17.30 Liljur
Mikukvøldð kl. 20 Ungdómsmøti.
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Hósdagin kl. 18 Tim5.
Sunnudagin kl. 17 Møti.

**Keldan, Skálafirði:**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Jens M. Petersen úr DK og Beintu Joensen.
Sunnudagin kl.17, Møti við Bjartu og Trúgva Petersen.
Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikumorgun kl. 6 Bønarløta.
Mikudagur 28. nov. kl. 20 Bíbiltími – Ef.3,14-21 Grundfest í kærleika v/Jonhard Olsen.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Tabor Toftir**
Sjómanskvinnuringurin samlast týskvøldið 27. nov. kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar. Innsavnan verður fyri sjómansmissiónina.

**Missiónshúsið í Rituvík**
Mikudagin kl. 17.30 Barnaringur.
Kl. 20:00 Bønarmøti
Hósdagin kl. 19 Juniorringur. Fyri børn 5. – 7 flokk.
Leygardagin 1. des. kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 18 Møti.

**KFUM & K, Klaksvík**
Mikukvøldið 28. nov Eingin bíbliutími verður orsaka av at føðingardagur verður hildin í húsinum.

**Aglow Sandoy**
Jólahugni verður í Samljóð leygarkvøldið 1. des. kl. 19. Allar kvinnur og menn eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Týskvøldið kl. 20 verður bíbliutími og bønarløta.

**Vitnið, Hvalba**
Á møtinum fríggjakvøldið 30.11. kl. 20 talar Óli á Grømma og vísir myndir 375021.

**Silvurbrúdleyp:**
Týsdagin 27. nov. hava Anna Maria og Heðin Zachariasen Streymnes, verið gift í 25 ár. Tey eru burturstødd.

**Prógv**
14. november tók Beinta Lisberg, Oyri, prógv sum Heilsurøktari á Social- og Sundhedsskolen í Esbjerg.

**60 ár**
Mikudagin 28. november verður Johanna Joensen, Tórshavn 60 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 1. des. frá kl. 11-16 heima í Vallalíð 1.

**70 ára føðingardagur.**
5. desembur verður Marius Vang, Leirvík 70 ár. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík, leygardagin 8. desembur frá kl. 18.

**70 ár**
Mikudagin 28. november fyllir Jósvein Østerø, Klaksvík 70 ár. Dagurin verður hildin í KFUM & K í Klaksvík frá klokkan 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**80 ár**
Fríggjadagin 14. desember verður Marianna Madsen á Teigunum, Sandur, 80 ár. Dagurin verður hildin sama dag í Ungmannahúsinum Virkið kl. 19.30. Tey ið vilja gleða hana við at koma í føðingardag verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 373245, 581495 ella 0045 22633048 í seinasta lagi 2. desember.

**Krúndiamant brúdleyp**
Hósdagin 29. nov. hava hjúnini Ada og Jógvan Petersen á Sandi krúndiamant brúdleyp. Dagurin verður hildin hjá Egga Petersen frá kl. 17 tann 29/11. Øll sum vilja gleða okkum eru hjartaliga vælkomin.

**Diamantbrúdleyp**
Týsdagin 4. desember kunnu hjúnini Karolina og Hans Müller Kvivík (búsitandi á Mørkini í Streymnesi) halda diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**Silvurbrúdleyp**
Sunnudagin 30. desember kunnu hjúnini Ann Arnadóttir og Hjørleif Dahl, Norðskála, halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Eydnuni á Oyrarbakka leygardagin 29. desember kl. 13-17. Tey, ið vilja hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 422353 ella 222403 innan 7. desember.

**Brúdleyp**
Leygardagin 1. desember giftast Olevina Egilstoft, Sandavágur og Rolf Herup Olsen, Tórshavn. Vígslan verður í Sandavágs kirkju kl. 14 og veitsla fyri innbodnum í Pálsstovu kl. 19.

Leygardagin 1. desember klokkan 16.00 giftast í Kaldbaks kirkju Rannvá H. Skeel Johannesen, Tórshavn og Oddfríður Marni Rasmussen, Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum.

Sunnudagin 2. des. kl. 13.00 giftast í Havnar kirkju Alma Heinesen, ættað úr Sørvági og Michael Vogn Pedersen, Silkeborg. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 18.00.

**Hey hey**
Vit bæði giftast 28. desembur. vígslan verður í Betesda í Klaksvík kl. 13. Vælkomst verður kl. 20 á Hotel Norð á Viðareiði. Tey ið hava hug at tekna seg til vælkomst, kunnu tekna seg á tlf. 589896 ella 264714. Síðsta freist at tekna seg er 1. desembur.


***Hans Jacob Østerø & Signa Drenkstein Johannesen***

Leygardagin 29. desember kl. 16 giftast í Sumbiar Kirkju, Beinta Lisberg, Sumba og Røgvi Joensen, Oyri. Veitslan verður í VB-Húsinum kl. 18. Tey sum vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 581193 (Beinta), +45 21783141 (Røgvi), 370529 (Sumba), 422208 (Oyri), innan leygardagin 8. desember.

